

## Pump-gun stolin í Gøtu

Løgreglan í Eysturoy leitar í hesum døgum eftir eini byrsu, sum er stolin úr einum húsum í Norðragøtu. Byrsan hevur ikki verið nógv brúkt og tí veit eigarin bara, at hon er stolin ímillum 18. oktobur og 6. novembur. Talan er um eina kalibur 12, pump-gun, so hon er nokk so eyðkend. Annars bíðar løgreglan eftir at fáa seriunummarið fyri at kunnað eyðmerkja byrsuna heilt nágreiniliga. Maðurin, sum eigur byrsina harmast um hendingina og hevur álit hansara á medmenniskjuni, fingið eitt skot fyri bógvin, er tað ikki so løgið, tí hann sigur, at húsini hava staðið ólæst í 45 ár, men tað er ongantíð hent nakað-fyrrenn nú.

# nesen

eisini greitt frá í bóka-verkinum Sigling og útbúgving.

Vit kunnu spyrja okkum, hvussu tað hevði verið, um Fishcher Heinesen hevði verið verðandi í Marstal. Hann hevði allarhelst verið ein væl umtóktur lærari og gjørt sítt arbeiði til lítar, men fyri Klakvík hevði hann ikki komið at spælt sama leiklut, sum hann gjørdi.

Tað stríð, sum kom at verða í Klaksvík kring danska læknan Olaf Halvorsen, kom at seta sín álvarsliga dám á Klaksvík.

Í hesum stríði fekk Fisher Heinesen ein stóran leiklut, og kom hann at standa sum tann, sum stóð á oddan í læknastríðnum. Ein stórur partur av bókini er um leiklutin hjá Fisher í hesum stríði til hann fekk dóm og var settur fastur. Eisini um tá ið hann slapp leysur aftur og varð móttikin sum ein fólkahetja í Klaksvík.

Sjúkrahússtýrið var felags fyri øll trý sjúkrahúsini. Hetta var vist ikki rætt sambært lógini. Hvørt sjúkrahús átti at hava sítt stýri. Einki er at ivast í, at um tað bert var sjúkrahússtýri fyri Klaksvíkar sjúkrahús sum setti læknan, so var Olaf Halvorsen settur í starv. Fischer Heinesen helt tí, at sjálvt grundarlagið fyri setanini var skeivt. Tað er kanska tað, sum fekk Fischer Heinesen í leiklutin sum oddamaður í einum stríði, sum hann ikki slapp burturúraftur, tá ið kollektivar kreftir høvdu tikið ræðið.

Fischer kom eftir øllum at døma at taka nógva skuld uppá seg sjálvan. Hann tók sína straff sum ein maður, men tað skaddi ikki hansara umdømi og neyvan heldur hansara persónsmensku.

Restin av bókini er ein mosaik av frásøgnum, eitt núumhvussudamsluppirnar fungeraðu, og hvussu tað var at sigla við livandi fiski til bretska marknaðin.

Hevði Fischer ikki verðið sjómansskúlalærari, hevði hann helst verið veðurfrøðingur, tí alt um veðrið hevði hansara stóra áhuga, bæði sum vísindi og sum søguligir upplýsingar. Hann var streymkønur sum fáur og gav dúgliga út av síni vitan. Hesar frásagnirner í seinna part av bókini eru eins áhugaverdar sum tað, ið hann skrivar um forna sigling og alt tað, sum teir gomlu brúktu fyri at finna leiðina fram eitt nú við at brúka skuggafjøl, sólarstein og til at duga at sigla eftir aldini.

Til endast tekur Óli Olsen saman um lívið og virksemi hjá Fischer Heinesen. Tað var heppið, at Óli Olsen fekk skjølini frá Honnu, dóttir Fischer. Hetta er ein lýsing av einum spennandi manni, og einum trúgvandi menniskja, sum ofta vísti til skriftstøð í Bíbliuni.

Tað tíð, eg arbeiddi á Føroya Fornminnissavni kom eg at kenna Fischer Heinesen sum ein kønan, men eisini sera spekulativan man. Hann hugsaði djúpt, og hann hevði síni prinsippir.

At enda fari eg at ynskja Óla Olsen til lukku við bókini."

### Søgan um bókina

Síðani greiddi Óli frá sínum arbeiði við hesa bók, sum byrjar við, at ein dagin kom Hanna, dóttir Fischer, við rúgvismiklum pappírstilfari, sum vóru endurminningarnar hjá pápanum, umframt nógv annað, sum Fischer hevði felt á blað – eisini tá hann sat handar rimar í Tinganesi. Hetta var tann tíð í hansara lívi, tá hann kanska hevði best tíð til at skriva. Hanna vildi hava at vita frá Óla, hvat skuldi gerast við hetta. Òli tók tilfari við sær, settist at lesa og gavst ikki fyrr enn hann hevði lisið tað alt.

Úrslitið gjørdist hendan bókin.

Aftaná, at Óli hevði havt orðið, handaða hann borgarstjóranum fyrsta eintak av bókini.

Til seinast takkaði Hanna Johannesen, dóttir Fischer, Óla fyri hetta avrik, sum hann hevði gjørt, og sum eisini var í samsvar við sjónarmiðið hjá pápanum, at "latið ikki søguna doyggja".



*Stórur er áhugin og Óli signerar*



*Borgarstjórin í Klaksvík Steinbjørn Jacobsen og Janus Jacobsen*



*Jóan Pauli Joensen gevur bókini um Fischer gott skoðsmál*



*Bjarti Petersen á sjómansheiminum saman við konuni Jónu*



*Døtur og abbabørn hjá Esther og Fischer Heinesen: Esmar, Elsa, Henrikka, Hanna Johannesen, dóttir, Fischer og Doris Heinesen dóttir*



*Sámal hjá Barbu, sum í mong ár umsat sosialmál hjá Klaksvíkar Kommunu, saman við Karstin Hansen*



*Systrarnar Elsa, Lea, Emma og Jónhild. Elsa Jacobsen og Doris Heinesen hava arbeitt saman í Etiopia*